# Háskúlaskeið við mótasýning

**Í sambandi við eitt skeið fyri menningartarnað á Føroya Fólkaháskúla var skipað fyri almennum tiltaki á skúlanum mikukvøldið 26. oktober við framsýning av lutum og mótaframsýning**

MÓTASÝNING

*Myndir: Jens Kristian Vang*



Seinastu vikuna og fram til fríggjadagin 28. oktober hava 20 fólk við menningartarni verið á háskúlaskeiði. Skeiðið er grundað á eitt samstarv millum Føroya Fólkaháskúla, Pedagogskúlan og leiðarar á Serstovnadeildini.

Skeiðið er skipað soleiðis, at Háskúlin bjóðar frálæru í drama, smíð, tilevning og foto. Saman við pedagoglesandi skipa leiðararnir á Serstovnadeildini fyri frálæru í lívsstøðuni hjá tí einstaka háskúlanæminginum.

Høvuðsevnið á skeiðnum í ár er sjálvsfatan og kropsfatan. Hvussu síggja vit okkum sjálvi, hvussu síggja onnur okkum og hvussu ynskja vit, at onnur skulu síggja okkum.

Arbeitt hevur verið við kroppinum, hvar er nakkin?, hvar endar armurin og hvar byrjar hondin? Arbeitt var eisini við persónligum reinføri, og hvussu vit klæða okkum.

Mikukvøldið 26. oktober varð arbeiðið sýnt fram, og skipað var fyri einum almennum tiltaki á Háskúlanum, har høvi varð at síggja lutirnar, ið framleiddir vóru í handaligu lærugreinunum. Hæddarpunktið á kvøldinum var mótasýning, har fólk við menningartarni sýndu klæðir fram.

Myndamaður okkara var við til mótasýningina og tók hesar myndirnar.











